


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 26 - 06 - 2012

# Shell borar í Alaska í juli

Tað er ikki bert um okkara leiðir, at spennandi boring fer fram. Lond og oljufeløg fylgja í løtuni komandi boringunum hjá Shell út fyri Alaska. Og tað ganga neyvan nógv ár, til eisini norska Statoil fylgir hálendska oljufelagnum og fer at bora í Arktis. Fyri føroyingar er tað heldur ikki uttan áhuga eisini at merkja sær, at tað er ein føroyingur, sum er settur at standa á odda fyri nýggju arktisku eindini hjá Statoil. Og eingin ivi er um, at Rúni M. Hansen neyvt fylgir gongdini, nú Shell sum fyrsta oljufelagið er um at seta á undirgrundina har norðuri. Heilur floti á veg Um nakrar fáar dagar verður sett hol á eitt heilt nýtt kapittul í amerikanskari oljusøgu, tá Shell fer inn í havið norðan fyri Alaska við einum heilum flota av oljuskipum. Shell hevur vónir um at fáa fatur á nøkrum av teimum 90 milliardunum av tunnum av olju, sum flestu jarðfrøðingar halda liggjar fjaldar í undirgrundini. Felagið er als ikki ókent um hesar leiðir. Tað hevur verið í hesum partinum av Arktis áður og borað leitibrunnar har bæði í 80-unum og 90-unum, sum síðani tá hava freistað hetta eina av heimsins størstu oljufeløgum til at brúka nógvar milliardir krónur í eini spildurnýggjari verkætlan. Men fleiri forðingar steðgaðu hesi ætlan á sinni, eitt nú tann lækkandi oljuprísurin og seinni óhappið við Exxon Valdez við strond Alaska. Og síðani aftur Macondo vanlukkan í einum øðrum parti av USA. Men 20 ár seinni, nú vit skriva juni í 2012, er Shell aftur tilreiðar at fara eftir Arktisku oljuni, sum eisini er vorðin so aktuell aftur, eftir at ísurin í Arktis er farin at bráðna skjótari og skjótari. 20 milliardir Shell hevur arbeitt við hesi nýggjastu verkætlanini í sjey ár og brúkt umleið 20 milliardir uppá hana higartil eitt nú til tess at klára tøkniligu avbjóðingarnar og liva upp til umhvørviskrøv og og mongu lógarkrøvini annars. Hóast flestu av loyvunum eru komin í hús, so er framvegis okkurt, sum restar í, men sum ikki verður roknað við fer at koppa verkætlanini. Men

løtan nærkast, tí 1. juli er ásettur at vera dagurin, tá henda risaverkætlan skal fara av bakkastokki av álvara. Shell skal bora tríggjar brunnar í Burger leitimiðinum í Chukchi havinum og tveir í Sivilluq leitimiðinum í Beufort havinum. Umleið 35 skip skulu brúkast til teir fimm brunnarnar og er ætlanin at seta borin í seint í juli. Veðurvindeygað er sera stutt, also loyvir ísurin bara boring í nakrar fáar mánaðir. Shell fer at brúka tvey boriskip til uppgávuna. Tað hevur brúkt 2,5 milliardir krónur til at umvæla og umbyggja boriskipini til ta stóru og avbjóðandi uppgávuna. Tey mongu skipini, sum skulu fylgja boriskipunum, eru har m.a. fyri at forða fyri eini dálkingarvanlukku. Shell hevur eisini lagt fram eina sera umfatandi umhvørvisætlan fyri boringarnar, sum myndugleikarnir hava sagt gott fyri. Kortini royna umhvørvisfelagsskapir og partur av upprunafólkinum í Alaska at gera alt fyri at steðga boringunum, sum tey halda kunnu skaða vistfrøðigu skipanina har norðuri. Shell hinvegin leggur dent á, at felagið borar í grunnum havøkjum, har trýstið í undirgrundini heldur ikki er so høgt, verður samanborið við djúpa Macondobrunnin í Meksikanska flógvanum. Eisini sigur Shell seg hava tikið avgerð um ikki at bora ella arbeiða í økinum, tá stórhvalir, sum alaskabúgvar fara eftir, koma tann vegin. Statoil eisini við Nú stórar broytingar fara fram í Arkis orsakað av veðurlagnum, og øki, har møguleiki er at finnn olju og gass, gerast ísfrí, fylgja nógv lond gongdini hjá Shell í Alaska. Hon kann koma at vísa øðrum oljufeløgum vegin. Lond sum Rusland og Norra fara sum vera man at fylgja við í øllum tí, sum Shell fyritekur sær norðan fyri Alaska komandi mánaðirnar. Og millum fólkini, ið standa á brúnni hjá Statoil, er føroyingurin Rúni M. Hansen, sum fyri stuttum varð settur sum leiðari av nýggju arktisku eindini hjá Statoil. Norska felagið er virkið bæði í Barentshavinum, út fyri Grønland, Kanada og Alaska. So tað ganga neyvan nógv ár, áðrenn eisini Statoil av álvara verður partur av oljuævintýrinum í Arktis  og við ongum minni enn einum føroyingi við stýrisvøl. Myndir -  Kulukk, boriskipið, sum er umvælt í Seattle í USA og nú verður gjørt klárt til at bora norðan fyri Alaska. Sí eisini kort frá økjunum, har borað verður.